6

AVF

LØGTINGIÐ

Finnur Helmsdal, løgtinsmaður
Mouritsarvegur 7
FO-188 Hoyvík

Landsstýrismálanevndin

**29. april 2008**
**j. nr. 7.13-20080003[5] ks/td**
(at tilskila í svari)

Sagt verður frá, at soljóðandi skriv í dag er sent Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismanni, Fiski- og tilfeingismálaráðið, Postboks 347, FO-110 Tórshavn:

**"Viðvíkjandi málinum um innflutningsloyvi og flyting av fiskiloyvum til nýggja Næraberg**

Við skrivi, dagfest 11. apríl 2008, hevur Landsstýrismálanevndin fingið svarskriv frá Fiski- og tilfeingismálaráðnum, har innlit í málið viðvíkjandi innflutningsloyvi og flyting av fiskiloyvum til nýggja Næraberg verður játtað. Viðlagdar skrivinum eru 4 journalsakir hjá ráðnum við frumskjølunum hjá ráðnum í hesum málunum.

Málið varð umrøtt á fundi í Landsstýrismálanevndini tann 24. apríl 2008.

Landsstýrismálanevndin undrast yvir, at Fiski- og tilfeingismálaráðið á hendan hátt sendir frumskjøl hjá ráðnum út úr húsinum. Gjørt varð av at senda skjølini aftur til Fiski- og tilfeingismálaráðið og biðja ráðið um at gera nevndini eina frágreiðing við einum samandrátti av málinum, herundir við eini lýsing av gongdini og viðkomandi upplýsingum í sambandi við, at upprunaloyvið varð givið, og hvørja ferð loyvi hevur skift eigara. Eisini verður ráðið biðið um at senda nevndini avrit av teimum skjølunum, sum eru nevnd í, ella eru viðkomandi fyri hesa frágreiðing.

Svarfreistin er sett til 16. mai 2008.

Avrit av hesum skrivi er sent Finni Helmsdal, tingmanni, til kunningar."

N.v.

Heidi Petersen
formaður